*Dagf. 7. februar 2020*
*HMR. J. Nr. 20/00070-5*

***Kaj Leo Holm Johannesen***
***landsstýrismaður***

***Svar***

***upp á***

**Skrivligan fyrispurning nr. S-1/2019: Viðvíkjandi útisiglarum og inngjaldi til Heilsutrygd frá Johan Dahl, løgtingsmanni**

**Fyrispurningurin var soljóðandi:**

1. Hvørjar politiskar og løgfrøðiligar grundgevingar hevur landsstýrismaðurin fyri at krevja inngjald til Heilsutrygd frá útisiglarum, umframt at teir eisini skulu gjalda til Folketrygd í Norra?
2. Hvørjar ætlanir hevur landsstýrismaðurin um at sleppa útisiglarum undan inngjaldi til Heilsutrygd, tá teir eisini gjalda til Folketrygd í Norra. Verður t.d. arbeitt við at leggja málið fyri rættin til viðgerðar og støðutakan og/ella at broyta heilsutrygdarlógina?
3. Hvussu nógvir útisiglarar gjalda inn til Heilsutrygd, árliga og býtt upp á slag av útisiglarum?
4. Hvussu stóra upphædd gjalda útisiglarar inn til Heilsutrygd árliga og býtt upp á slag av útisiglarum?

**Svar:**

**Til spurning 1**

Løgfrøðiliga má Heilsutrygd, sum almennur stovnur, halda seg til galdandi lóggávu í Føroyum. Í hesum máli hevur Heilsutrygd hildið seg til ásetingina í § 24, stk. 1 í heilsutrygdarlógini, ið ásetur at øll, sum hava fylt 18 ár og sum eru fevnd av lógini, skulu gjalda heilsutrygdargjald. Í juni 2019 tók Kærunevndin í almanna-, familju- og heilsumálum avgerð um at broyta avgerðina hjá Heilsutrygd, soleiðis at gjaldsskyldan, sum er áløgd kæraranum sambært heilsutrygdarlógini, fellur burtur. Hetta vísandi til "Nordisk konvention om social sikring". Heilsutrygd hevur nú møguleikan antin at fylgja kærunevndaravgerðini ella at fara í rættin við málinum.

Til spurningin um politiskar grundgevingar kann leggjast afturat, at sambært § 154b í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt (skattalógini), kann ein persónur, ið er fevndur av "Nordisk konvention om social sikring", og sum eisini hevur inntøku í Føroyum, fáa kreditt í føroyska skattinum fyri gjaldið til t.d. Folketrygd í Noreg ella aðrar sosialar veitingar, sum koma undir "Norðurlendsku

konventiónina um sosiala trygd”. Gjaldið til t.d. Folketrygd telur sostatt við í Føroyum, sum um talan var um inntøkuskatt, goldin í Noreg.

Hetta merkir, at um nevndu persónar ikki skulu rinda til Heilsutrygd, samstundis sum teir fáa kreditt í skattinum fyri gjaldið í Noreg, so er úrslitið í veruleikanum, at onki verður goldið, tá samanum kemur, samstundis sum persónarnir hava rætt til at móttaka veitingar frá Heilsutrygd.

**Til spurning 2**

Síðani nýggjastu avgerðirnar hjá Kærunevndini í almanna- familju- og heilsumálum, hevur Heilsutrygd gjørt av at royna málið í rættinum, so rætturin kann avgera, hvat er rætt og skeivt í hesum máli. Vónandi skapar hetta rættarmál greidleika viðvíkjandi verandi støðu. Um Heilsutrygd ikki fær viðhald í rættinum, má eg taka støðu til, hvørt neyðugt er at broyta heilsutrygdarlógina, soleiðis at hon samsvarar við “Nordisk konvention om social sikring”.

**Til spurning 3**

Tað er TAKS, sum krevur heilsutrygdargjald inn fyri Heilsutrygd. TAKS upplýsir, at tey hava niðanfyristandandi hagtøl fyri 2018:

Inntøka frá útisiglarum (fiskiskip eru ikki íroknað):

DIS (Dansk Internationalt Skibsregister): 333 persónar hava forvunnið 131.649.968 kr.

Inntøka við Brunnbátum:

Noreg: 56 persónar forvunnið 28.758.228 kr.

Danmark: 17 persónar forvunnið 8.433.417 kr.

Onnur lond: 8 persónar forvunnið 3.201.094 kr.

Inntøka við farma- og veitingarskipum (gr. 25b):

Noreg: 257 persónar forvunnið 138.652.985 kr.

Danmark: 46 persónar forvunnið 19.617.292 kr.

Onnur lond: 69 persónar forvunnið 36.222.421 kr.

Viðmerkjast skal, at tað kann koma fyri, at sami persónur kemur fyri í meira enn einum av omanfyrinevndu tølum.

Viðmerkjast skal eisini, at ”Nordisk konvention om social sikring” bert er galdandi millum Norðanlond. Sáttmálin er ikki galdandi í Ríkisfelagsskapinum, t.v.s. ímillum Føroyar, Danmark og Grønland. Í mun til spurningin um heilsutrygdargjald og ”Nordisk konvention om social sikring”, mugu omanfyristandandi hagtøl um Danmark og DIS tí trekkjast frá.

**Til spurning 4**

TAKS hevur ikki víst á, hvussu nógv heilsutrygdargjald hesir borgarar rinda. TAKS vísir eisini á, at tað kann koma fyri, at sami persónur kemur fyri í meira enn einum av omanfyri nevndu tølum.

Sum nevnt omanfyri, er “Nordisk konvention om social sikring” bert galdandi millum Norðanlond. Sáttmálin er ikki galdandi í Ríkisfelagsskapinum, t.v.s. ímillum Føroyar, Danmark og Grønland. Hetta hevur við sær, at ein møgulig frítøka fyri heilsutrygdargjaldi, stuðlað á Norðurlendska sáttmálan, ikki hevur ávirkan á heilsutrygdargjaldið frá DIS-inntøkum og inntøkum hjá føroyingum í Danmark annars.

Í talvuni niðanfyri hevur Heilsutrygd tó sett upp, hvussu stórt heilsutrygdargjaldið er við hesum fortreytum:

- Eingin borgari gongur aftur í tølunum
- Allir hesir borgarar skulu rinda heilsutrygdargjald fyri alt árið, t.v.s. eisini tað fasta mánaðargjaldið av hesari inntøkuni

Talvan er tillagað, soleiðis at tal av borgarum, inntøka og heilsutrygdargjald frá DIS-arum og teimum sum arbeiða í Danmark, eru tikin burturúr samlaðu tølunum.

| Upplýst í telduposti frá TAKS 5/2-2020 | | | | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| ár | tal | Noreg | Danmark | Onnur lond | | inntøka tilsamans | HTgjald mðr | HTgjald innt. | HTgjald mðr íalt | HTgjald innt. íalt | HTgjald íalt |
| DIS | 333 | 0,00 | 0,00 | 0,00 | 0,00 | 131.649.968 | 175 | 0,60% | 699.300 | 789.900 | 1.489.200 |
| Brunnbátar | 56 | 28.758.228 | | | | 28.758.228 | 175 | 0,60% | 117.600 | 172.549 | 290.149 |
| Brunnbátar | 17 | | 8.433.417 | | | 8.433.417 | 175 | 0,60% | 35.700 | 50.601 | 86.301 |
| Brunnbátar | 8 | | | 3.201.094 | | 3.201.094 | 175 | 0,60% | 16.800 | 19.207 | 36.007 |
| Farma- veitingarskip | 257 | 138.652.985 | | | | 138.652.985 | 175 | 0,60% | 539.700 | 831.918 | 1.371.618 |
| Farma- veitingarskip | 46 | | 19.617.292 | | | 19.617.292 | 175 | 0,60% | 96.600 | 117.704 | 214.304 |
| Farma- veitingarskip | 69 | | | 36.222.421 | | 36.222.421 | 175 | 0,60% | 144.900 | 217.335 | 362.235 |
| Tilsamans | 786 | 167.411.213 | 28.050.709 | 39.423.515 | | 366.535.405 | | | 1.650.600 | 2.199.212 | 3.849.812 |
| | | | | | | | | | | | |
| Tilsamans uttan DIS og DK | 390 | 206.834.728 | | | | 206.834.728 | 175 | 0,60% | 819.000 | 1.241.008 | 2.060.008 |

Heilsumálaráðið, 7. februar 2020

**Kaj Leo Holm Johannesen**
landsstýrismaður